# Óljóðið spilti løtuna

**Tað, ið eftir ætlan skuldi vera ein innilig og andalig konsert við Martini Joensen, varð oyðilagt av óljóðinum av áskoðarum, ið ikki høvdu hug at vera áhoyrarar**

UMMÆLI
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*


*Martin hevði sonin Sakaris Joensen við sær á pall hetta kvøldið*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Lagt var upp til eina heldur intima framførslu, tá Martin Joensen, skuldi á pall í Kelduni, tí var tað heldur undrunarvert, at hann ikki var settur á skrá hóskvøldið, tá stólarøðini vóru inni í salinum í Kelduni, ístaðin fyri fríggjakvøldið, tá Keldan var gjørd klár til eitt rættiligt rokkkonsert setup.

Í rokanum av fólki, ið júst var komi á festival og hittist við vinum og kenningum, gjørdist framførslan hjá Martini eitt stríð móti ljóðinum. Fyrstu løtuna stríddist Martin Joensen og vælleikandi bólkurin móti ringa ljóðinum, ið var dominerað av einum rungandi bassi. Keðiligt og spell, men hetta gjørdist tó betur eftir nøkur løg. Tað skal sigast, at hetta við ringum ljóði tey fyrstu løgini var galdandi fyri nærum allar framførslurnar á festivalinum, men í flest øllum førum gjørdist tað, eins og hjá Martini, betur eftir eina løtu.

## Eitt suð av óljóði

Hin ljóðtrupulleikin var eitt suð av óljóðið úr salinum, fólk, ið prátaðu, børn, ið spældu og bara generellur larmur av fólki, ja, suðið var so ógvisligt, at eg bert havi hoyrt líknandi í stórum handilshúsum uttanlands. Hetta gjørdi tað nærum ómøguligt at liva seg inn í inniligu og hjartaligu framførsluna hjá Martini og bólkinum. Ójóðið tók ikki móti frá teimum, teir stríddust manniliga.

Martin presenteraði seg sjálvan, sum Martin hjá Mili hjá Mili hjá Hannu úr Vestmanna. Við sær hevði hann, tríggjar dugnaligar harrar. Eyðun Hansen á gittara var sum altíð fralíkur. Tað klæddi tónleikinum, at hava frálíka dobro spælið hjá Jákupi Zachariassen við. Teir báðir Jónleif Jensen á trummum og Pauli Magnussen á bassi, ið vanliga spæla saman við Martini, vóru ikki við. Trummurnar vóru sleptar til hesa konsertina og nýggjur maður á bassinum var sonur Martin, Sakaris Joensen, ið nokk best er kendur sum bassleikari í Lama Sea og hjá Guðrið Hansdóttir.

## Innilig løg

Martin og hinir borðreiddu við eini sangskrá, ið var rættiliga friðarlig, og hetta gjørdi bara óljóðið uppaftur týðiligari. Á skránni vóru rættiliga nógv løg av nýggjastu fløguni hjá Martini. Fyri okkum, ið ikki eru heilt ung longur, var tað stuttligt, at ikki færri enn trý løg úr sangleikinum Skuggagestir, ið Martin skrivaði fyrst í nítiárunum sluppu við. Eisini vóru nøkur onnur løg, ið hóskaðu til eina inniliga konsert á skránni.

Tað var bert í teimum meira rokkendu løgunum sum Einsamallur og Maskuspæl, at Martin og teir megnaðu at spæla uppum larmin í salinum. Eg byrjaði at ræðast, at tað kravdi eitt undur, at steðga larminum, men lukkutíð átti Martin eitt undur í ermuni. Tí tá hann endaði konsertina við Morgun, tagnaði larmurin.

# Tannleysur poppur


*Hóast orkan var í lagi, so var tað ein heldur løHk framførsla, tónlistarliga sæð, hjá svensku Charizma*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Hóast orkan var í lagi, so var tónleikurin hjá svensku Charizma ikki nakað at skriva heim um. Fangaðir millum 80'ini og nútíðina megnaðu teir ikki at halda fast í fjøldini, sum minkaði, so hvørt framførslan leið**

UMMÆLI
*Petur Háberg*
*petur@sosialurin.fo*

Vegna veður varð alt flutt inn fríggjakvøldið, og gav hetta eitt sindur av seinkingum í skránni. Alt gekk nú fyri seg á einum palli. Seinkingar eru ongantíð ynskiligar, men sum veðrið var hetta kvøldið, gjørdi tað ikki so nógv. Karm ella bíða eina løtu eyka?

Upp móti 400 áhoyrarar vóru savnaðir í salinum, tá ið sviarnir í Charizma fóru í gongd. Skjótt gjørdist greitt, at hetta ikki fór at teljast millum bestu framførslurnar á festivalinum.

## Í tvístøðu

Hóast bólkurin spældi væl saman, so var talan um tannleysan og einkisigandi tónleik. Tá skal sigast beinanvegin, at her verður bara hugsað um tónleikin, tí eingin ivi var um, at teir meintu tað teir sungu. Millum sangirnir varð dúgliga práta, og mitt í framførsluni hevði ein av limunum eina talu.

Men tónlistarliga var tað tíverri einki at reypa av. Sangarin sang einki serliga væl. Kýtti seg eitt sindur ov nógv og rakk til tíðir ikki upp á tónarnar. Hinvegin var hann í gongd alla tíð og dugdi væl at fáa samband við áhoyraran.

Charizma hevur verið til í meiri enn tjúgu ár. Teir byrjaðu sum tungrokkarir í 80'unum, men hava so flutt seg yvir í popp. Og tað kennist eitt sindur sum at teir eru fangaðir mitt millum hesi: 80'ara rokk og nútímans popp. Ein sjúka, sum hevur verið mongum bólki at bana.

Klæðini og look'ið hjá bólkinum byggir eisini undir hetta uppáhaldið. Bassleikarin var íklæddur ein leðurjakka, pannuband um høvdið og sólbrillur omaná pannuband(!). Trummarin var sum tikin úr 80'unum við bleiktum hárið og stroppatroyggju. Hinvegin var sangarin smartur og væl klæddur. Tvey tíðarskeið í einum. Og í hesum føri ein vánalig blanding.

## Skjótt svenskt snakk

Millum sangirnar prátaðu teir sum nevnt dúgliga, og tað er nakað, sum ein til tíðir saknar í framførslum.

Men alt var á svenskum. Á skjótum svenskum. So tekur tú fólkatutl, mikrofonskurr og ein skjótttosandi svia, so skulu oyrini spílast rímiliga væl út, um tú skalt skilja nakað.

Fleiri av vanligu spurningunum sum 'Eru tit við uppá tað?' og 'Orka tit meiri?' flugu beint yvir høvdini á teimum flestu, við tí úrsliti, at eingin svaraði aftur. Spurningurin er so, um tað veruliga var tí, at fólki ikki var við uppá tað ella ikki orkaðu meir. Men kenni eg føroyskar áhoyrarar rætt, so fáa tílíkir spurningar eitt brølandi 'JAAAA' ella eitt floyt ella eitt klapp ella okkurt annað. Enskt hevði uttan iva riggað betri.

Sum framførslan leið minkaði áhoyrarafjøldin, og tá ið síðsta lagið varð spælt, vóru tað ikki nógv meiri enn fimti fólk í salinum.

Framførslan hjá Charizma fer ikki at renna hesum ummælaranum í hug, tá ið hugt verður aftur á hæddarpunktini fyri Fjarðafestivalin 2007.